# Uttan belti kanst tú drepa annan

**Situr tú uttan trygdarbelti, kanst tú gerast orsøkin til, at onnur í bilinum doyggja, hóast tey eru íbundin**



*Leys fólk á baksetrinum kunnu verða orsøk til, at bilførari doyr, hóast hann situr íbundin. Fólkini, sum ikki eru íbundin, verða slongd á bilføraran, sum t. d. kann bróta hálsin, vísir kanningin*

TRYGDARBELTI

Ein kanning, sum bretski ferðslugranskingarstovnurin TRL hevur gjørt, vísir, at vandin hjá bilføraranum at doyggja í eini bilvanlukku økist við nærum tí dupulta, um tey, ið sita aftan ikki eru í trygdarbelti.

Kanningin vísir eisini, at vandin hjá bilførarnum fyri at láta lív er størri, tá bilførarin sjálvur er íbundin, meðan tey, sum sita aftan ikki eru bundin. Tey, ið sita leys, verða tá slongd fram á tey, ið sita bundin. Sostatt kunnu tey gerast orsøkin til, at tann, ið situr í belti brýtur hálsin og doyr.

*Kelda: TRL (Transport Research Laboratory)*

rs






*Síðani fyrsti bilurin kom til Føroya 6. mai í 1922, hava um 250 fólk látið lív í ferðsluni Fleri enn 40.000 fólk doyggja hvørt ár av ferðsluvanlukku í Evropa...*

## Bilurin - vinur og fíggindi

Í 1922 kom fyrsti bilurin til Føroya, og hann hevur eyðvitað verið okkum føroyingum hentur á sama hátt, sum hann hevur verið tað fyri fólk í øðrum londum.

Men bilurin hevur eisini kravt síni offur og ger tað framvegis. Bara í Evropa doyggja fleiri enn 40.000 fólk hvørt ár av ferðsluvanlukku. Og hóast tað hava verið nógv kríggj síðan Seinna heimsbardaga, so hevur bilaferðslan í sama tíðarskeiði tó kravt fleiri mannalív enn øll hesi kríggj tilsamans.

Fyrsta ferðsluvanlukkan í Føroyum, sum kravdi mannalív, hendi 2. september í 1928, og til og við 2003 hava 248 fólk látið lív í ferðsluni. Frá 1997-2003 hava 27 látið lív í ferðsluni, av teimum vóru 16 millum 15 og 24 ár.

Tað finnast tíverri ikki nóg góð tøl viðvíkjandi fólki, sum hava fingið skaða í ferðlsuni, og hvussu álvarsligir skaðarnir hava verið.

*Kelda: Ávegis til Nullhugsjónina.*

rs






*Subaru Legacy AWD 2004 er ein heilt nýggjur bilur, sum kemur á marknaðin, júst 50 ár eftir at fyrsti Subaru kom á gøtuna í Japan í 1954*

# Nýggjur Subaru Legacy All Wheel Drive

**Í ár eru liðin 50 ár síðan fyrsti Subaru kom á marknaðin í februar 1954, og Subaru Legacy kemur nú í fjórðu generatión. Bilurin verður gjørdur sum sedan, stationcar og sum Outback. Subaru Legacy AWD er kosin ársins bilur í 2004 í Japan**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað at Subaru eru kendir sum álítandi og slitsterkir bilar, hevur gjørt japanska bilmerki heimskent. Subaru vóru fyrstir og hava áralangar royndir við fýrahjólsdrivnum bilum.

Subaru Legacy 2004 er ein heilt nýggjur bilur, sum er 55 kg lættari enn forgangarin og meira økonomiskur. Bensinnýtslan er 18 prosent lægri og effektin er økt við 10 prosentum.

Øll Subaru modellini hava AWD (All Wheel Drive). Fyri at fáa tyngdipunktið longur niður, situr motorurin nú 2,2 cm longri niðri enn á forgangaranum. Koyrieginleikarnir eru eisini merktir av at motorurin er so niðarliga í motorrúminum, hetta ger bilin hevur fast vegtak og er sera góður at koyra, bæði á vanligum koyrivegi, á ósløttum, í brattlendi og ikki minst í kava.

### Sedan, Wagon og Outback

Allir Subaru hava »Hill-holder«, sum er ein góð hjálp hjá bilføraranum, tá bilurin stendur í mótbrekku. Bilurin fer ikki eftir hæli, um bilførarin sleppur bremsuni. Legacy hevur skivubremsur framman og aftan, sum geva bilinum 50 prosent betri bremsueffekt enn forgangarin.

Legacy fæst við trimum ymiskum motorum: 2,0 litur við 138 hk, 2,5 litur við 165 hk, og 3,0 litur 6. syl. við 245 hk.

Legacy 3,0 GL við automatgirum og leðursetrum v.m. er ein sannur luksusbilur.

Legacy fæst í útgávunum: Legacy Sedan, Legacy Wagon og Legacy Outback, sum bert verða framleiddir sum stationcar.

Allar útgávurnar hava stereo/CD, alufelgur, forbrúksmátara, klimaanlegg, aktivar nakkapútur framman, ABS bremsuskipan við EBD, 4 airbag v.m. sum standard. 3,0 litur útgávan hevur eisini eyka gardinairbag.

Derek Brockie, frá D.B. Bilum væntar at Subaru Legacy 2.0 AWD Stationcar 2004 kemur síðst í mai.

## Subaru Legacy 2,0 AWD sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4. syl. bensin 138 hk |
| 0-100 km/t | 11,2 sek |
| Bensinnýtsla | 13,0 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 466,5 cm |
| Breidd | 173,0 cm |
| Hædd | 142,5 cm |
| Eginvekt | 1410 kg |
| Prísur | kr. 317.800,- |
| Søluumboð | P/F D.B. Bilar<br>J. Bronckgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 310 600<br>www.dbbilar.fo |

*Subaru Legacy Wagon kemur til Føroya síðst í mai*

*Legacy innan. Smart innrætting og ein væl koyrandi bilur í allar mátar*



